## Klinikkassistentur.

Fyri klinikkassistent í farloyvi verður søkt eftir avloysara til skúlabarnatannarøktina í Gøtu.

Arbeiðstíðarskeiðið verður frá uml. 15. aug. 2006 til uml. 1. juli 2007. Arbeiðstíðin er 60% tíð. Lønt verður eftir sáttmálanum ímillum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Er tørvur á øðrum upplýsingum kunnu hesir vendast til kommunskrivaran á tlf. 441012 ella e-post *gota@gota.fo*

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum og/ella viðmælum má verða kommununi í hendi innan 29. mai 2006 kl. 12.

Umsókn kann sendast:
Gøtu kommuna
Postrúm 40
510 Gøta
ella í postsmoguna á kommunuskrivstovuni.

**Gøtu Kommuna**



## Blákrossheimið
blakrossheimid@blakross.fo

***Søkt verður eftir náttarvakt:***
Við hesum verður søkt eftir náttarvakt til Blákrossheimið.

***Uppgávur/arbeiðsøki:***
- Verða um búfólk um náttina
- taka telefon
- fyrifallandi praktiskt arbeiði
- samtala við búfólk og tey sum ringja inn um náttina

***Førleikar/eginleikar:***
- tú ert álitisvekjandi og álítandi
- tú dugir væl at arbeiða við menniskjum
- tú ert fyrikomandi og hevur samstarvsvilja
- tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- tú vilt arbeiða samsvarandi blákrosshugsjónini
- tað er ein fyrimunur at tú hevur ástøðiliga útbúgving

***Løn/setanartreytir:***
Talan er um starv uppá 0,7 tíð. Lønin verður ásett smb. avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Meiri fæst at vitað um starvið við at venda sær til Olgu Magnussen á tlf. 315575 ella olga@blakross.fo

Umsókn saman við evt. prógvum, viðmælum v.m. skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 29.mai kl 12:00
Umsóknin skal sendast til Blákrossheimið

**Blákrossheimið**
Olga Magnussen, Leiðari
Lynggøta 12
FO-100 Tórshavn

Blái Krossur Føroya hevur smb. §2 í viðtøkum felagsins til endamáls:
- at hjálpa menniskjum, ið eru illa støðd av rúsdrekkaávum
- at fyribyrgja, at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni
- at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi
- at boða gleðiboðskapin um Guðs kærleika til menniskju

# Lýsing eftir mekanikarum

P/F Petur Larsen søkir við hesum eftir mekanikarum at byrja skjótast tilber.

**Førleikakrøv:** Útbúgving í minsta lagi sum maskinsmiðjur.

**Kravt verður av umsøkjarum, at hesir hava førleika í:**
- Arbeiði við rustfríum tilfari, sum umfatar sveising og bukking.
- Arbeiði við aluminium, sveising og bukking v.m.
- Arbeiði við dreyðing og fresing.
- Arbeiði við rørlegging
- Annars alt vanligt maskinarbeiði.
- Aftrat omanfyri nevndu krøvum verður upplæring í arbeiði við Baader flakamaskinum og Fomaco saltsproytum.

Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til P/F Petur Larsen á tlf. 444174 í vanligari arbeiðstíð millum kl. 8.00 og 17.00.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu vera P/F Petur Larsen, Postboks 64, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi 1. juni 2006 kl. 16.00.

Felagið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

**P/F Petur Larsen**
Bakkavegur
530 Fuglafjørður

SJÓVAR KOMMUNA

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulspedagogi/hjálpara til Sjóvar kommunu at byrja 1. august 2006.

Endamálið við stuðlinum er í samstarvi við foreldur og dagrøktarleiðara/ansingarstovn at menna børn við serligum tørvi, ið eru í ansing hjá kommununi.

Arbeiðsstaðurin verður í fyrsta umfari í dagrøktarheimum og spælistovuni. Tá dagstovnurin letur upp í heyst, verður arbeiðsstaðurin á stovninum.

Abeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. 447158.

Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda Sjóvar kommunu í seinasta lagi 1. juni 2006.

**Sjóvar kommuna**
Skúlavegur 10
490 Strendur

## Lærlingur til Kvik Køkar

Søkt verður eftir dugnaligum og ágrýtnum lærlingi til handil okkara.

Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi læruppláss, í einum handli í støðugari menning.
Tú kemur at samskifta við nógv fólk, at tekna køkar og baðirúm og útrokna tilboð.

Eitt hugnaligt arbeiðspláss við góðum samstarvsfelagum.

Lærutíðin er 3 ár um umsøkjarin hevur FHS og 2 ár um umsøkjarin hevur HH.

Umsóknarfreistin er 1. juni 2006 og skulu umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum sendast til:

**Kvik Køkar**
Hoyvíksvegur 65 · Postsmoga 3182 · 110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um læruplássið við at venda sær til Hans Michael Hansen á tlf. 312480 ella 512480

kvik

Kvik Køkar er ein fyritøka, ið varð stovnað í 1991. Vit selja køkar, baðirúm, klædnaskáp, hvítvørur og tilhoyr. Eisini hava vit eina deild við gávulutum og brúkslist

**FORSKALLING · KRANI · LASTBILUR**

**TIL SØLU** **Tel. 371 302**

## Dramaverkstaðið
# Loyniklubburin

verður sýndur á Dramaverkstaðnum á Hálsi í Havn (í brekkuni niðan til tað grønu ítróttarhøllina á Nabb).

**Fríggjadag 19. mai kl. 19.00**
**Leygardag 20. mai kl. 16.00**
**Sunnudag 21. mai kl. 16.00**

Leikurin er ca. 30 min. langur og er ætlaður børnum 6 til 12 ár. Helst saman við vaksnum. Atgongumerkir á 30 kr. kunnu keypast við dyrnar 1 tíma undan sýning.

*Gravarhjálp*

*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800